FØROYA PEDAGOG FELAG

# Aðalfundurin

29. mars 2008

Brævatkvøðugreiðsla til formansval og nevndarval – Vísandi til viðtøkur felagsins § 8,stk.7

Teir limir, ið ynskja at greiða brævatkvøðu til formansval og/ella nevndarval, fáa við at venda sær til felagið sendandi atkvøðuseðil.

Brævatkvøðuseðilin skal vera nevndini (advokati felagsins) í hendi í seinasta lagi vikudagin undan aðalfundinum – t.e. leygardagin 22. mars 2008

**Nevndin**

umhvørvisstovan

## FRÁBOÐAN UM UMHVØRVISGÓÐKENNING

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Umhvørvisstovan tann 26. februar 2008, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, nr. 4 og 4a, seinni broytt í grein 5, nr. 1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, hevur góðkent:

**Toskaalistøðina á landi hjá P/F Faroe Cod Farm í Hvalba (Nes)**

Góðkenningin liggur alment frammi á Umhvørvisstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Umhvørvisstovuni, Traðagøta 38, Postrúm 2048, FO-160 Argir, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

**Umhvørvisstovan**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14 · Postrúm 272
110 Tórshavn · www.setur.fo

# Lektari/adjunktur í støddfrøði

Treytað av játtan á fíggjarlógini fyri 2008 er eitt útbúgvingar- og granskingarstarv í støddfrøði leyst at søkja á Náttúruvísindadeildini (NVD) á Fróðskaparsetrinum. Starvið verður sett sum lektaraella adjunktstarv, treytað av førleika umsøkjarans. Lektarin/adjunkturin skal menna undirvísing og gransking í støddfrøði á Náttúruvísindadeildini.

Útbúgvingarparturin fevnir um fakliga samskipan og um undirvísing í støddfrøðiligum lærugreinum, ið eru í útbúgvingunum á NVD. Á www.nvd.fo er kunning um, hvussu støddfrøði inngongur í bachelorútbúgvingar á NVD.

Granskingarparturin vil í stóran mun vera tengdur at seróki umsøkjarans. Tað er viðkomandi, at umsøkjarin kann vísa á ítøkiligar møguleikar fyri at fremja sína gransking í tilknýti til granskingarumhvørvi á øðrum universitetum.

Væntað verður, at umsøkjarin í ávísan mun kann luttaka í granskingarverkætlanum á NVD, ið krevja støddfrøðiligt innlit.

Umsøkjarar skulu hava PhD førleika innan støddfrøði ella kunna dokumentera, at teir eru um at vera lidnir við sína PhD-verkætlan.

Umsóknarfreistin er 12. mars 2008. Sett verður ein metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sín førleika.

Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til Hans Paula Joensen, megindeildarleiðara, á teldupostadressu hanspj@setur.fo ella á telefon 352550.

Starvið verður sett frá 1. august 2008. Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae), avritum av próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum ritgerðum (í 4 eintøkum) skulu stílast til niðanfyristandandi adressu.

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J.C. Svabos gøta 14
FO 100 Tórshavn

Náttúruvísindadeildin (NVD) á Fróðskaparsetrinum veitir Bachelor of Science (B.Sc.) útbúgvingar innan lívfrøði, verkfrøði og jarðalisfrøði. Í einstøkum førum ber til at taka Ph.D.-útbúgving. Undirvísingin verður veitt av starvsliðnum á NVD, sum telur 7 fólk, 6 adjungeraðum lektarum/professarum við fakligari ábyrgd av ávísum skeiðum og av umleið 40 uttanseturs undirvísarunum, ið starvast á øðrum stovnum og virkjum í Føroyum og uttanlands. Í løtuni eru 4 Ph.D.-verkætlanir og ein Post. Doc. verkætlan í gongd á NVD. NVD luttekur í granskingarverkætlanum í samstarvi við aðrar stovnar og granskarar bæði innan- og uttanlands.

# Umboðsráðsval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val hósdagin 27. mars 2008.

4 umboð í Tórshavnar valdømi eru uppá val.

Uppskot til umboð skulu skrivliga verða sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 13. mars 2008

**HAVNAR SJÚKRAKASSI**
**Tórshavn 25. februar 2008**

# Skrivstovustarv á Føroya Barnaheimi

Á Føroya Barnaheimi er eitt ½-tíðar starv leyst til setan 01.04.2008.

Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði

Vit sóknast eftir einum starvsfólki við skrivstovuútbúgving ella líknandi og arbeiðsroyndir innan hettar økið. Viðkomandi má kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v. m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 14.03.2008.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Finnur Helmsdal, leiðara, á tlf. 312320.

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

# Sethús á Tvøroyri til sølu

Matr. nr. 213 á Tvøroyri til sølu um hóskandi boð fæst

**Tlf. 004566106537/ 004530423470 eftir kl. 18.00.**

# BRÚÐARKOYRING



Skalt tú hava eina serliga uppliving, so er at leiga ein bil hjá Havnar Bilasavni frá Sp/F Bilrøkt í Havn. Vel t. d. ein svartan Ford A frá 1930, ein hvítan Chevrolet frá 1931, ein bláan Chevrolet Skyline frá 1952 ella ein brúnan Jaguar frá 1978

**Ring til Bilrøkt á 588880**
www.bilrokt.fo bilrokt@bilrokt.fo




**Byrjar 4. mars 2008**

**Tilmelding á tlf. 216021**

KOYRI FRÁLÆRA
**Hoyvíksvegur 61** 21 60 21